# Nýggj føroysk fótbóltsrás

**Televarpið hevur játtað Fótbóltssambandinum at senda frá føroyskum mansfótbólti á sjónvarpsrásini Rás 1. Hóast FSF ikki vil gera viðmerkingar, tí málið enn ikki er búgvið, er líkt til, at fyrsta fótbóltssendingin longu verður fríggjakvøldið**

NÝGGJ FÓTBÓLTSRÁS
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin*

Alt bendir á, Fótbóltssambandið fer at kappast við Kringvarp Føroya um at senda frá fótbólti. Televarpið, ið eigur føroysku sjónvarpsrásina Rás 1, hevur nevniliga játtað Fótbóltssambandinum at nýta rásina til at gera fótbóltssendingar.

- Vit fingu ein fyrispurning frá FSF um at nýta Rás 1, og hesum hava vit játtað. Avtalan snýr seg í høvuðsheitum um, at FSF sleppur at senda føroyskan fótbólt í eina royndartíð, sigur Edvard í Skorini Joensen, virkandi stjóri á Televarpinum.

Hann vísir á, at sum er, er eingin annar, ið ítøkiliga hevur bjóðað seg framat, hóast fleiri fyrispurningar hava verið, millum annað frá skrivandi fjølmiðlunum.



*FSF vil ikki játta tíðindini um, at felagið fer at senda frá fótbólti. Eg kann bert viðmerkja, at málið enn ikki er búgvið, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari*

*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

### Uni Arge sum royndarvertur

FSF vil ikki játta tíðindini um, at felagið fer at senda frá fótbólti.

Eg kann bert viðmerkja, at málið enn ikki er búgvið, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari.

Enn er óvist at siga nakað ítøkiligt um skapið á fótbóltssendingarnar, sum FSF fer at borðreiða við.

Men, sum Sosialurin hevur frætt, verður talan í øllum um kjaksendingar, og tann fyrsta verður longu fríggjakvøldið. Uni Arge váttar, at hann hevur verið við til at gjørt onkra royndarsending, sum síðani hevur verið eftirmett av FSF, men hann leggur dent á, at hann ikki er settur í starv sum sjónvarpsvertur á nýggju fótbóltsrásini.

- Eg kann bert siga, at eg framvegis arbeiði sum samskiftisfólk í Føroya Banka, sigur Uni Arge, ið umframt at hava spælt fótbólt í HB í mong ár, er útbúgvin journalistur.

Sostatt er óvist, um FSF fer at halda seg til kjaksendingar ella um talan eisini verður um beinleiðis dystarfrásagnir í myndum.

### Ónøgdsemi við Kringvarpið

Tað kann tykjast heldur óvanligt, at Fótbóltssambandið av sínum eintingum tekur stig til at gera fótbóltssendingar. Sáttmálin millum ÍSF og Kringvarp Føroya um útvarping av fótbólti gekk út 1. januar, og hóast arbeiðið at gera ein nýggjan sáttmála er komið væl áleiðis, er eingin semja komin enn.

Tískil er ein nærliggjandi tanki, at Fótbóltssambandið ætlar at taka málið í egnar hendur. Tað er jú eingin loyna, at Fótbóltssambandið hevur verið stak ónøgt við Kringvarp Føroya, sum treyðugt hevur viljað nevnt bestu mansdeildina fyri "Formuladeildina". Eisini hava ymisku fótbóltsfeløgini víst sína ónøgd um, at Kringvarpið hevur noktað at gera upptøkur, har lokalu stuðlarnir verða vístir í bakgrundini.

Men sum tað framgongur aðrastaðni á síðuni, eru ítøkiligar samráðingar um nýggjan sáttmála millum ÍSF og Kringvarp Føroya.

---

# Kringvarpsstjórin visti av ongum

**- Samráðingarnar um ein nýggjan sáttmála um rættindi at senda frá ítrótti eru komnar væl áleiðis, og nú vantar bert ein undirskrift, sigur Jógvan Jespersen, ið viðgongur, at tíðindini um, at FSF fer at senda á Rás 1, kemur óvart á seg. ÍSF-forsetin er tó ikki heilt samdur um sáttmálasamráðingarnar**



*- Satt at siga, er hetta nýtt fyri meg, men kapping er altíð góð, sigur Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri*

NÝGGJ FÓTBÓLTSRÁS
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin*

Tíðindini um, at FSF ætlar at taka kappingina upp við Kringvarp Føroya um útvarping av fótbólti, koma óvart á kringvarpsstjóran.

- Satt at siga, er hetta nýtt fyri meg, men kapping er altíð góð, sigur Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri, ið leggur afturat, at hann ikki rættiliga dugir at síggja, hvussu FSF skal fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

Hann vísir á, at tað er dýrt at framleiða sjónvarp, serliga tær beinleiðis dystarfrásagnir.

Hóast Jógvan Jespersen sigur seg vera bilsnan um, at FSF sjálvt tekur stig til at kappast við Kringvarp Føroya, óttast hann ikki at Kringvarpið missir rættindini at senda frá fótbólti.

- Sáttmálin gekk út fyrsta januar, men ein nýggjur sáttmáli er gjørdur, og nú vantar bert yvirskrift, sigur kringvarpsstjórin, ið vísir á, at á seinasta fundi við ÍSF varð líkt til, at partarnir vórðu samdur.

- Vit høvdu fund í apríl, og tá vórðu vit, eftir mínari áskoðan, samdir um treytirnar, sigur Jógvan Jespersen.

### ÍSF-forsetin ósamdur

Heðin Mortensen, forseti í ÍSF, sum er mótparturin í sáttmálasamráðingunum, er tó ikki heilt samdur við kringvarpsstjóran.

- Samráðingarnar eru ikki lidnar. Nøkur evni eru ikki komin upp á pláss enn. Tað er eingin loyna, at vit hava verið ósamdir um fjølmiðlaviðgerðina og kunngerðina av stuðlum, so sum rumblið um heitið á bestu mansdeildina í fótbólti. Har eru vit enn ikki komnir á mál, men eg eri bjartskygdur, sigur Heðin Mortensen, ið leggur afturat, at ÍSF ikki blandar seg upp í, hvat undirsambandið FSF ger í hesum sambandi.

Hann leggur tó dent á, samstarvið millum ÍSF og Kringvarp Føroya er sera gott, og at hann ynskir at halda fram.

Men viðvíkjandi skapinum av sáttmálanum millum ÍSF og Kringvarpið dugir hann ikki at spáa um.